# Einki er avgjørt

*Bergleif Sólsker hjá B71 var nøgdur um úrslitið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*




**Liðformaðurin hjá B71 var fegin um javnleikin, men hann helt, at ein minst líka trupul uppgáva bíðar í Sandavági komandi vikuskifti**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Hóast teir mest sum á stokkinum mistu sigurin á B68, so helt liðskiparin hjá B71, Bergleif Sólsker, eftir dystin, at javnleikurin var eitt úrslit, sum teir væl og virðiliga kunnu liva við.

- Tað kunnu vit saktans. Og vit kunnu í øllum førum betri liva við hesum, enn B68 kann. Vit vóru - serliga móti endanum - hart kroystir, men vit høvdu tað hepnið, sum skuldi til, og tað rakk.

Næsta leygardag hava tit aftur tein truplan dyst, tá tit vitja hjá FS Vágum. Og tann dysturin er væl eins avgerandi, sum hesin var tað?

- Heilt avgjørt. Tað er einki sum helst avgjørt enn, men tað er ein fyrimunur fyri okkum, at vit fingu javnleik her í dag, tí nú kunnu vit avgera alt sjálvir. Men tann uppgávan verður altso eins trupul sum hendan, um hon ikki verður enn truplari.

Hóast hann soleiðis tóktist nøgdur um avrikið, so ásannaði Bergleif, at B71 kanska læt seg trýsta ov nógv, eftir at teir høvdu lagt seg á odda. Ein støða, sum liðið annars hevði vunnið sær, meðan teir tóktust hava tamarhald á dystinum.

- Vit eru nógvir ungir mans á liðnum, og tí klára vit kanska ikki at vera nóg »cool«, eftir at vit eru komnir á odda. Har kemur kanska eitt sindur av panikki í, men samnumtikið, so haldi eg altso, at hetta var eitt gott úrslit fyri okkum, staðfesti hann at enda.

# Í bíðistøðu

**Toftamenn ásannaðu, at hetta ikki var eftir ætlanini, og at teir nú bara mugu vóna, at sandoyingarnir kiksa onkra staðni í seinastu dystunum**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*


*Arnbjørn Danielsen, B68, var minni nøgdur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast frøin var eyðsýnd, tá B68 skoraði útjavnandi málið, so var Arnbjørn Danielsen, liðformaður, skjótur at staðfesta, at javnleikurin ikki var akkurát tað, sum teir vóru komnir eftir.

- Tað var tað so bestemt ikki. Vit komu fyri at vinna dystin, men tíverri so gekk tað ikki.

Tað sá annars út til, at tit fyri steðgin høvdu eitt gott tak á dystinum. Hvat hendi eftir steðgin, tá tit líka sum missa takið?

- Vit brúka kanska øgiliga nógvar kreftir ígjøgnum dystin, og tað er kanska eitt viðvirkandi til, at vit ikki koma so nógv at baklinjuni eftir steðgin. Tí megna vit so heldur ikki at skapa nóg nógvar møguleikar, men tíbetur eydnaðist tað okkum hóast alt at stríða okkum upp til javnleikin.

Og fór tað gjøgnum høvdið, at alt árið kanska var farið fyri skeyti, tá teir løgdu seg á odda.

- Sjálvandi fara nakrir tankar ígjøgnum høvdið, men tað kom ikki panikkur í, haldi eg. Vit vistu, at tað var nógv tíð eftir, og vit hava fleiri ferðir í ár vent líknandi støðum, so vit trúðu alla tíðina upp á møguleikan.

*Og hvussu verður so restin av árinum?*

- Nú mugu vit so bara vinna okkara. Og so mugu vit bara vóna, at B71 missir stig onkrastaðni. Annað fáa vit ikki gjørt, og merkir tað so, at kappingin verður longd við tveimum vikum, so mugu vit eisini taka tann partin við, helt Arnbjørn Danielsen at enda.

# Javnleikur í grannauppgerðini

**Talan var ikki um tey heilt óvæntaðu úrslitini, tá hondbóltskappingin byrjaði, men hoyvíkingar prógvaðu aftur, at Kyndil ikki skal taka nakað fyri givið í grannauppgerðini**

ATLANTIC-AIRWAYS KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Hondbóltskappingin fór ígongd um vikuskiftið, og hjá monnum vórðu allir tríggir dystirnir avgreiddir í øllum góðum.

Undan premieruni mundi størsti spenningurin snúgva seg um dystin í Hoyvíkarhøllini, har Kyndil kom á vitjan. Og tann dysturin skuldi eisini vísa seg at verða júst so spennandi, sum roknað varð við.

H71 hevur seinnu árini havt eitt serligt lyndi at arga Kyndil, og soleiðis gjørdist aftur í ár hjá liðnum, sum aftur í summar hevur heintað nakað av styrki frá teimum grønu. Hesa ferð við Jakob Jónsson á spælaralistanum og Hannis Wardum sum venjara.

Kyndil tóktist annars vera á sigurskós fyri tað mesta, og bara fimm minuttir fyri dystarlok høvdu teir eina trý málaleiðslu. Men so steðgaði alt upp. Hoyvíkingarnir skoraðu tríggjar ferðir á rað seinastu løtuna, og so kundu teir fegnast um, at teir longu nú hava víst grønu grannunum, at teir ikki skulu kenna seg serliga tryggar, tá grannauppgerðir eru á skránni.

## Óvæntaður spenningur í Vestmanna

Hin dysturin leygardagin var millum VÍF og KÍF, og tað gjørdist ein dystur, sum bleiv nakað nógv meira spennandi, enn heimaliðið hevði ætlað.

Fyrstu 40 minuttirnar hildu teir seg eisini frammanfyri, og tó at VÍF móti endanum royndi at seta ferð á, so var tað ikki meira enn akkurát, at tað eydnaðist.

Í so máta var talan um heldur meira sannførandi avrik hjá Neistanum, tá teir tóku ímóti StÍF. Eisini strandingarnir eru nakað skerdir av, at fótbóltur eisini er á skránni fyrstu dystirnar, og fyri tað nógva var tað eisini Neistin, sum var omaná. Eitt stutt skifti megnaðu gestirnir tó at halda sær nær javnleikinum, men í longdini var hetta ov lítið.

## Fakta um dystirnar

**H71-Kyndil 29-29 (12-16)**
**Málskjúttar**
**H71:** Halgir Dahl Olesen 8, Piti Negru 7, Johnny Durhuus 5, Jakob Jónsson 4, Tróndur Vatnhamar 3, Sigtór Andreasen 1, Esbern Patursson 1
**Kyndil:** Rókur Akralíð 8, Høgni Klein 7(2), Marius Joensen 5, Hans Áki Dal-Christiansen 2, Ragnar Stakksund 1, Janus Einar Sørensen 1
**Brotskøst:** H71 1, Kyndil 3
**Útvísingar:** H71 5, Kyndil 3
**Reyð kort:** H71 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason

**VÍF-KÍF 31-29 (13-14)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** John Zachariassen 8, Agnar Joensen 7, Harald Bjørgvin 5, Áki G. Olsen 4, Sjúrður Poulsen 3, Sámal Joensen 3, Daniel Rápa 1
**KÍF:** Karl Jóhan Djurhuus 12(2), Mirko Milinkovic 4, Petur Martin Poulsen 4, Arnbjørn Hansen 4, Damir Oros 3(1), Rógvi Weihe 2
**Brotskøst:** VÍF 1, KÍF 3
**Útvísingar:** VÍF 1
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Neistin-StÍF 25-20 (12-11)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Blagoje Buha 7, Roar Dalsgarð 7, Áki Mørk 4, Helgi Michelsen 2, Tróndur Kragesteen 2, Rani Slættanes 1, Dann Thorleifsson 1, Bogi Simonsen 1
**StÍF:** Leivur Justinussen 8(4), Artur Johansen 5, Jón Rasmussen 2, Borgar Danielsen 2, Bent Djurhuus 1, Bárður Danielsen 1, Rúni Niclasen 1
**Brotskøst:** Neistin 1, StÍF 4
**Útvísingar:** Neistin 9, StÍF 5
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen